# MASKINMEISTARIN

Nr. 8 / Mai 2019



## Markus er eitt hátøkniligt arbeiðspláss



Úr Svínoy til Grønlands og Rio de Janeiro



Aðalfundurin 2019



16 maskinmeistarar og 12 maskinistar

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**Blaðnevnd**
Ólavur Gunnarsson, ábyrgd
Regin Olsen

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Blaðhald**
Tey, sum ynskja at halda MASKINMEISTARAN, kunnu boða frá hesum í teldupost til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,– kr. um árið; t.e fyri 4 bløð

**Endurgeving**
Endurgeving bert loyvd samsvarandi lógini um upphavsrætt. MASKINMEISTARIN kann takast niður sum pdf á heimasíðuni hjá felagnum, www.mf.fo

**Forsíðumyndir**
*Maskinmanning á Markus:*
Ingolf S. Olsen
*Bjarni Jacobsen:*
Grækaris D. Magnussen
*Aðalfundurin 2019:*
Øssur Wintereig
*Prógvhandan:*
Erland Hentze Rasmussen

**Umsiting og redaksjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig
ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen
ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris Djurhuus Magnussen
grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting, prent og liðugtgerð**
Estra 478500

Upplag: 800

# INNIHALD

AÐALFUNDURIN 2019
- Níggju sáttmálar undirskrivaðir í 2018 ........... 5
- Tveir synir við maskinmeistara í búkinum ....... 8
- Støðugt limatal ........ 10
- Pensjónspengar í íbúðir ........ 10
- Fyrsta kvinna í nevndina ........ 11

Markus er eitt hátøkniligt arbeiðspláss ........ 12
NMF hevði fund í Føroyum ........ 16
Tøkni og betri hugburður skal minka um dálking ........ 18
16 maskinmeistarar og 12 maskinistar ........ 22
Úr Svínoy til Grønlands og Rio de Janeiro ........ 24
Føðingardagar ........ 30
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum ........ 30








# Semjan minkar um skaðan



10. apríl kom seinasti sáttmálin í hesum umfarinum loksins til høldar.

Talan er um sáttmálan millum Maskinmeistarafelagið og Føroya Reiðarafelag, og tað skuldu tríggir undanfundir, fimm samráðingarfundir og ein long seming, sum varði í útvið eina viku, til, áðrenn partarnir at enda skrivaður undir.

Útgangstøðið fyri samráðingunum var trupult, tí vit vildu broyta orðingina í grein 17, stk. 3 í felagsreglunum, sum eftir fatanini hjá reiðarunum gav teimum heimild at draga allan kostnaðin fyri kvotur keyptar á uppboðssølu frá avreiðingarvirðinum, áðrenn býtt varð.

Stk. 3 ljóðaði soleiðis: „Avgjøld fyri fiskiloyvir av einum og hvørjum slag ganga av óbýttum, tó er keyp av føroyskum kvotum og/ella fiskidøgum millum føroysk skip ikki loyvdur frádráttur."

Við støði í hesari sera breiðu orðing hava reiðarar keypt kvotur fyri okurspris fyri síðani at turka stóran part av kostnaðinum upp í manningarnar.

Vit hava kært hesa tulking til Fasta Gerðarrætt, men av tí, at úrskurðurin ikki var gjørdur, og sáttmálaskeiðið var um av verða runnið, tóku vit málið aftur fyri yvirhøvur at kunna samráðast við Føroya Reiðarafelag. Um samráðingarnar ikki bóru á mál, skuldi málið tó gerast av í Fasta Gerðarrætti.

Partarnir vóru eisini samdir um, at sama hvør úrskurðurin í Fasta Gerðarætti hevði verið, so hevði spurningurin verði høvuðstema í samráðingunum. Soleiðis at skilja, at tann parturin, sum tapti málið, fór at seta fram krøv fyri at fáa ásetingina í grein 17, stk. 3 broytta til sín fyrimun.

Fyri yvirhøvur at kunna loysa hesar trupuleikarnar, gjørdu partarnir av ikki at hava so nógv onnur krøv við í samráðingunum, men heldur bíða til næsta ár, tá tað vónandi aftur verður talan um „vanligar" samráðingar.

Men kortini hildu partarnir meira og minni fast við sítt á samráðingarfundunum, og hóskvøldið 28. mars máttu vit ásanna, at vit ikki fingu nakað úrslit við vanligum samráðingum. Tí bleiv semingstovnurin boðsendur.

Semingsmenninir útsettu sum tað fyrsta eitt møguligt verkfall í eina viku.

Fundast bleiv síðani at kalla uttan íhald til leygarkvøldið 6. apríl, tá ið eitt semingsuppskot bleiv lagt fyri partarnir. Vit fingu skotbrá til mánadagin 8. apríl klokkan 13 at taka støðu, men okkara støða var greið beinavegin; vit kundu á ongan hátt góðtaka semingsuppskotið.

Somu niðurstøðu var Føroya Reiðarafelag komið til, men partarnir heittu tó á Semingstovnin um at gera eina semingsroynd afturat.

Eftir áhaldandi fundir á Hotel Føroyum varð eitt nýtt uppskot til semju lagt fyri partarnar, tá klokkan var farin um miðnátt týsmorgunin 10. apríl.

Hettar seinna uppskotið var munandi betri enn hitt fyrra, og báðir partar tóku undir við tí.

Talan er um eina eitt ára semju, sum gongur út 1. apríl næsta ár.

Við semjuni er gamla sjálvtøkuborðið í §17, stk. 3 ruddað, soleiðis at nú er útgreinað, hvørji avgjøld fyri fiskiloyvi kunnu trekkjast frá óbýttum, og í hvønn mun. Soleiðis hava vit nú fingið minkað um skaðan, sum stendst av, at áseting um frádrátt fyri avgjøld fyri fiskirættindi yvirhøvur er komin í sáttmálan í síni tíð.

Ávirkanin er komin niður á eitt støði, sum vit onkursvegna eiga at kunna liva við, og hettar í sjálvum sær má onkursvegna metast sum ein sigur.

Umframt broytingina í grein 17 hevur semjan eisini einstakar aðrar sáttmálatillagingar við sær, eitt nú betrað lønarviðurskifti undir sjúku og stytting av útmynstringartíðarskeiðum.

Vit vildu fegin, at manningar í ávísum veiðubólkum fingu meira í sín lut, men soleiðis er tað nú einaferð – vit mugu bara royna at gera tað betri fyri hesar í næstu samráðingunum, sum verða longu um eitt ár.

Ólavur Gunnarsson
*– formaður í Maskinmeistarafelagnum*




*Effektiv veiða, har góðskan fylgir við …*
*Kræsnir kundar, tí skal góðskan bara vera tað besta …*

VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo






*Ólavur Gunnarson, formaður legði fram sína fyrstu formanfrágreiðing*

# Níggju sáttmálar undirskrivaðir í 2018

*– Ein stórur partur av arbeiðinum hetta fyrsta árið hevur verið merkt av sáttmálasamráðingum, og í stóran mun hevur talan verið um sáttmálar, har sáttmálaskeiðið fyri langt síðani hevur verið farið, segði Ólavur Gunnarsson í síni formansfrágreiðing*

**TEKSTUR OG MYNDIR:** ØSSUR WINTEREIG – PRESS

– At sáttmálar ganga úr uttan at verða endurnýggjaðir hevur als ikki verið nøktandi, og hevur hettar sjálvandi ført til ørkymlan hjá teimum limum, sum hava verið umfataðir av hesum sáttmálum. Hetta er væl skiljandi, og fara vit á ongan hátt at góðtaka, at søgan endurtekur seg, nú tá ið sáttmálarnir ganga út aftur í heyst. Hesum hava vit boðað frá á rætta stað, og vónand taka tey hettar í størsta álvara.

Í formansfrágreiðingini fór formaðurin gjøgnum øll sáttmálaøkini:

– Vit hava ikki færri enn fýra sáttmálar við Fíggjarmálaráðið, hesir eru sáttmálin fyri alment sett á landi, har eitt nú maskinmeistarar á arbeiðseftirlitinum, sjúkahúsunum og landsverk eru, Strandfaraskip Landsins, Vørn og Magnus Heinason.

– Teir gingu út 1. oktober í 2017, og eitt tað fyrsta, sum eg sum formaður saman við restini av nevndini fór í holt við, vóru hesar samráðingarnar. Krøvini vóru handað nakrar fáar dagar frammanundan, eg tók við, ella rættari 12. mars, og byrjaðu samráðingarnar av álvara 4. apríl.

– Samráðingarstevið var so sum so, og aftan á fimta samráðingarfund, sum var 4. mai, máttu vit ásanna, at tað framvegis var so langt í millum

Framhald á næstu síðu >>



*Umleið 50 limir vóru møttir á aðalfundi*

partarnar, at ilt var at koma víðari uttan hjálp. Avgjørt var tí at fáa Semingsstovnin inn á banan. Grundað á at hesir vóru sera upptiknir av øðrum semingum, vóru vit settir í bíðiröð. Góðar tríggjar vikur seinni sluppu vit endiliga framat, og eftir eitt semingstørn upp á knappa viku bleiv semja undirskrivað fríggjadagin 1. juni.

– Úrslitið lá nakað oman fyri karmin, og eg haldi, at størsta frambrotið í semjuni vóru nýggju lønartalvurnar hjá ávikavist alment settum á landi, har ansiennitetsstigini blivu hækkað markant, og hjá Strandferðsluni, har stigini blivu fækkað hjá so at siga øllum starvsbólkunum – ein broyting sum bæði hækkar stigini og viðførir, at skjótari er at røkka fullan starvsaldur.

– Hjá Vørn hava vit ikki nógv at handla við grundað á, at lønarviðurskiftini eru hjá Tænastumannafelagnum og sostatt ikki nakað, vit hava ræðisrætt á, hettar ger samráðingarstøðuna hjá okkum sera veika.

– Hvat Magnusi Heinasoni viðvíkti, so bleiv tað fyri so vítt bert tann lønarhækking, sum karmurin hevði við sær. Tó so liggur tað fast, at nú nýtt skip kemur inn, so skal hetta takast upp við tí fyri eyga, at tað eisini endurspeglast á lønarseðlinum.

– Sáttmálaskeiðið her gongur bara til 1. oktober í ár. Vit fara fram ímóti sumrinum at hava fundir við limirnar, sum eru umfataðir av hesum sáttmálunum, og fara hesir fundir at leggja lunnar undir tey krøv, sum vit fara at leggja fyri mótpartin.

## KAF

– Sáttmálin við kommunala Arbeiðsgevarafelagið, KAF, fevnir um maskinmeistararnar hjá SEV og IRF, og gekk tann sáttmálin út 1. oktober 2017.

– Tað gekk sera striltið at sleppa fram at samráðingarborðinum, men í juni mánað bragdaði loksins, og vóru krøvini handað 11. juni. Vit høvdu fýra fundir hendan mánaðin uttan nakað frambrot. Samanlagt bleiv tað til sjey samráðingarumfør, uttan at tað eydnaðist at finna semju, og 1. oktober bleiv Semingsstovnurin innkallaður.

– Byrjað varð upp á sjálva semingina mánadagin 15. oktober, og vóru langir fundir heilt fram til hóskvøldið 18., tá vit fingu eitt semingsuppskot handað. Eftir at hava tugt upp á hettar uppskotið, bóðu vit um freist til á middegi dagin eftir at koma við svari, og bleiv tað okkum játtað.

– Eftir at hava sovið upp á tingini møttist nevndin aftur morgunin eftir til støðutakan. Niðurstøðan var, at vit ikki kundu góðtaka tað, sum fyrilá, og um vit ikki fingu onkra broyting inn, so vrakaðu vit uppskotið. Semingsmenninir blivu kunnaðir um støðuna hjá okkum, og hvat skuldi til fyri at fáa okkara tilsøgn. Svarið frá teimum var, at teir skuldu gera eina roynd at fáa okkara ultimativu krøv eftirlíkað, og um vit einki hoyrdu aftur, skuldu vit møta í Skibsteds pakkhúsi kl. 13 sum avtalað. Vit hoyrdu einki aftur, og stutt eftir kl. 13 bleiv semjan undirskrivað.

– Úrslitið lá gjøgnumgangandi nakað oman fyri karmin, tó so vóru tað ávísir bólkar, sum fingu væl yvir. Samanumtikið var talan um ta størstu lønarhækkingina tey seinastu nógvu árini.

– Sáttmálaskeiðið her gongur somuleiðis til 1. oktober í ár, og eru vit farnir í gongd við at raðfesta sáttmálakrøv til komandi samráðingar.

## FAG

– Her er talan um privat settar maskinmeistarar á landi og samráðingarnar gjørdust rættiliga skjótar og effektivar.

– Krøvini blivu handað 14. mai, og longu 6. juni var komið so langt, at partarnir samdust um at undirskriva nýggjan tvey ára sáttmála. Lønarhækkingin bleiv ávikavist 3,26 prosent fyrra og 2,56 prosent seinna árið. Umframt hetta fingu viðbótastigini eitt munandi lyft, og so blivu aðrar tillagingar gjørdar, sum eitt nú ásetingar um barsil og yvirtíð.

– Størsta avbjóðingin á hesum økinum er tó vantandi limaskapurin hjá maskinmeistarunum, sum eru í privatu vinnuni á landi. Vit hava verið á vitjan á onkrum arbeiðsplássum og tosað við bæði leiðslur og viðkomandi meistarar. Andin sýnist at verða positivur, so vónandi fer hetta at vísa seg aftur í økjandi limatali.

## Handilsskip

– Maskinmeistarafelagið hevur ein høvuðssáttmála fyri handilsskip og tveir sersáttmálar, sum eru fyri ávikavist størri og smærri skip í frálandavinnuni.

– Sáttmálarnir gingu út 1. mars í ár, og tyktist áhugi vera frá Reiðaríðnum fyri Handilsskip at koma í gongd í góðari tíð. Vit høvdu limafund í august, og høvdu vit longu tá gjørt eitt forarbeiði við okkara tankum um møgulig krøv.

– Hetta gjørdist ein góður fundur, sum gav nógvan og góðan íblástur. Aftaná blivu krøvini endaliga orðað, og vóru vit longu klárir tíðliga í vetur. Vit tóku síðani stig til ein fund við hini manningarfeløgini fyri at lodda dýpið, um talan kundi blíva um felags samráðingar. Vit samdust um at royna hetta.

– Leisturin var tann, at vit, út frá krøvunum hjá hvørjum einstøkum felag gjørdu eitt skjal við felagskrøvum, og harumframt hevði hvørt felag sær eisini nøkur serkrøv.

– Hini feløgini høvdu tó aðalfundir beint innan ársskiftið, og høvdu tey ynski um at bíða við at fara í gongd, til nýggju nevndirnar høvdu tikið við.

– Sáttmálasamráðingarnar byrjaðu 7. januar, og skuldu heilir 12 samráðingarfundir til, áðrenn komið var har til, at partarnir skrivaðu undir semju um nýggjar tvey ára sáttmálar fríggjadagin 1. mars.

– Semjan inniber eina lønarhækkan upp á ávikavist 3,26 prosent í 2019 og 2,56 prosent í 2020, sum eisini er størsta lønarhækkingin seinastu 10 árini.

## Føroya Reiðarafelag

– Tað eri ikki nøkur loyna, at nýggja lógin um sjófeingi hevur viðført broytingar hjá teimum, sum starvast innan hetta øki generelt, tó hjá onkrum í størri mun og hjá onkrum øðrum minni. Serliga er tað uppsjóvarflotin, sum hevur merkt broytingina, har lógarbroytingarnar hava viðført tilfeingisgjøld, uppboðssølur og menningarkvotur, sum alt hevur verið viðvirkandi til lækkandi hýrur á teirra øki.

– Hóast hesar broytingarnar, so valdi Maskinmeistarafelagið ikki at siga sáttmálan upp í 2018, mest grundað á alla ta ógreiðu, sum lógarbroytingarnar viðførdu, har man vildi bíða fyri at síggja, hvussu leikur fór.

– Eftirfylgjandi hevur man kunnað sannað, at hettar allarhelst ikki var rætta valið, og er tað serliga einstøk viðurskifti, eitt nú við frádráttinum av kvotukeypi, sum hava verið atvoldin til ørkymlan. Her valdu vit eftirfylgjandi at kæra málið til Fasta Gerðarrættin. Men ikki tykkum at siga, so er hettar ein long process, og nú, ¾ ár eftir at kæran bleiv latin inn, er málið langt frá klárt at taka upp til dóms. Sáttmálin hinvegin bleiv uppsagdur til at fara úr gildi 1.apríl, og tað er eingin ivi um, at talan verður um truplar samráðingar. Serliga við atliti at, at gerðarrættarmálið kemur í trol við samráðingarnar, og er tað at kalla vónleyst at samráðast um hettar, so longi málið koyrir.

– Hvat best er at gera, er ilt at meta um, men eitt er púra vist, hettar verður kardinalpunktið í komandi samráðingum.

### Aðrir sáttmálar

– Maskinmeistarafelagið hevur eisini aðrar sáttmálar, eitt nú fyri limir sum sigla hjá Polar Seafood í Grønlandi. Tann sáttmálin bleiv endurnýggjaður í januar seinasta ár og er í gildi frá 1. mars 2018 og í hvussu so er tvey ár fram. Sostatt kann hesin uppsigast at fara úr gildi komandi ár. Um hann verður uppsagdur, er støða ikki tikin til enn, men vit fara at taka eina støðulýsing út á heystið, sum so verður avgerandi fyri víðari framferð viðvíkjandi hesum.

– Felagið hevur eisini sáttmála við APK, sum er fyri grønlendsk rækjuskip. Hesin er av eldri dato, dagfestur at galda frá 1. januar 2006, hóast vit fleiri ferðir hava roynt at tikið stig til at endurnýggja hann, so tykist hin sáttmálaparturin ikki líka altráur eftir hesum. Fyrr í ár gjørdu vit enn eina roynd, men tó úrslitaleyst. Vit fara tó at halda fram at royna, og vónandi fer tað at eydnast fyrr ella seinni.

### Hent eftir aðalfundin

Semingsstovnurin kom uppí samráðingarnar og 10. april var nýggjur sáttmáli undirskrivaður. Í nýggja sáttmálanum er eitt nú ásett nærri, hvørjir frádráttir eru galdandi, tá fiskirættindi verða keypt.

## Tveir synir við maskinmeistara í búkinum

**TEKSTUR:** ØSSUR WINTHEREIG – PRESS

– Eg havi gingið við tonkunum at fingið varpað enn meira ljós á fakið, serliga tí at eg sjálvur eigi tveir tannáringar, sum tykjast at ganga við einum maskinmeistara í búkinum, allerhelst tí teir hava livað so tætt uppat einum, og harvið hoyrt so nógv gott og positivt um fakið, skoyttir formaðurin upp í sína formansfrágreiðing.

– Eg vildi so gjarna rokkið enn fleiri við hesum boðskapinum. Tankin hjá mær er at vit saman við øðrum viðspælarum sum eitt nú, Vinnuháskúlanum, Reiðarínum fyri Handilsskip, áhugaverdum aktørum úr vinnuni á landi og aktivum maskinmeistarum fóru undir eitt átak, har vit vitjaðu í skúlar kring landið. Tað kann bæði vera talan um miðnám og fólkaskúla, har vit kunnu greiða frá útbúgvingini og teimum fantastisku starvsmøguleikunum hon hevur við sær.

### Fleiri maskinmeistarar

– Seinasta árið eru 33 maskinmeistarar komnir út av Vinnuháskúlanum. Ávikavist 17 í juni og 16 í januar. Haraftrat fingu 13 maskinistar prógv so seint sum í vár.

– Formaðurin var sum vanligt til staðar á hesum hátíðarhaldinum, har hann handaði heiðursgávu og helt røðu. Eg fari eisini her at ynskja teimum vælkomnum í skaran.

– Í verandi løtu eru 116 maskinmeistaralesandi skrásettir sum lesandi á Vinnuháskúlanum, og er tað fløvandi at síggja, hvussu góða undirtøku hendan fantastiska útbúgvingin hevur.

– Tað eru eisini hend frambrot á hesum økjunum, har skúlin er farin undir eina aspirantútbúgving fyri maskinmeistaralesandi, har skift verður millum praktiska starvslæru og siðbundna skúlabonkin. Soleiðis verður møguleiki at koma út við vinnubrævi á øðrum stigi eftir hálvum fimta ári. Har var fyrsta upptøka í august í farna árið, og vóru tað átta sum tóku av møguleikanum. Tað verður spennandi at fylgja við útbúgvingini og síggja, hvussu leikur fer.

– Vinnuháskúlin fer eisini í framtíðini at bjóða maskinmeistarum víðari lesnað, soleiðis at ein við at taka ein yvirbygning uppá hálvt annað ár hevur møguleika at gerast bachelor í maskinverkfrøði. Hetta haldi eg eisini má metast sum eitt frambrot útbúgvingarmessiga, og gevur teimum sum veruliga hava fingið smakkin fyri lesnaðinum nakað at fara víðari eftir.






# MASKINFÓLK TIL SMOLTSTØÐINA Á STROND

Vit søkja eftir ágrýtnum maskinfólki til Smoltstøðina á Strond

**Arbeiðsøki**
Smoltstøðin er í gerð og í fyrstu atløgu verða uppgávurnar at leggja rør og installera maskinur og komponentar. Tú verður partur av einari vaktarskipan. Tú kemur at starvast í einum toymi, ið virkar fyri at ala fyrsta floks laksasmolt til at seta út í sjógvalingina hjá Bakkafrost. Tú fært góða upplæring í starvinum og kemur m.a. at røkja fylgjandi uppgávur:

- Viðlíkahald av maskinum og tekniskum útbúnaði, herundir pumpur, motorar, o.a.
- Arbeiða við Luft, Oxygen og UV-skipan
- Skráseting og uppfylging í viðlíkahaldsskipan (OPUS)
- Ymiskt fyrifallandi handverkaraarbeiði
- Røkt av fiski
- Virka fyri fiskaheilsu og fiskavælferð
- Røkja aðrar uppgávur á smoltstøðini

Tú fert at hava ábyrgd av øllum vanligum maskinarbeiði, sum m.a. fevnir um eftirlit, viðlíkahald og umvæling. Tú mást tola ávísar broytingar í starvinum. Á smoltstøðini verður arbeitt í vaktum, og tú verður partur av hesi vaktarskipan. Tá tú hevur vakt, skalt tú kunna koma til støðina innanfyri 20 min. um nakað skuldi verið áfatt.

**Meira at vita?**
Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Rógva Jacobsen, formann á tel. 23 57 23, ella við t-brævi til roja@bakkafrost.com ella Rúna Olsen, smoltalileiðara, á tel. 23 51 25, t-bræv ruol@bakkafrost.com

**Umsókn**
Send tína umsókn til hr@bakkafrost.com.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Um Bakkafrost: Bakkafrost er størsta alifyritøka í Føroyum. Samtakið hevur fulla virðisketu frá fóðri, smolt- og laksaaling, kryvjing, liðugvøruframleiðslu til sølu. Framleiðslan av mjøli, lýsi og fóðri er á Havsbrún í Fuglafirði. Kryvjivirkini eru á Glyvrum og í Vági, meðan liðugvøruframleiðslan (VAP) er á Glyvrum. Alivirksemið hjá samtakinum er í Norðoyggjum, Eysturoy, Streymoy, Sandoy og Suðuroy. Høvuðsskrivstova felagsins er á Glyvrum. Samanlagt hevur samtakið 820 fulltíðar starvsfólk.

BAKKAFROST
ESTABLISHED 1968

Bakkavegur 9 • PO Box 221 • FO-625 Glyvrar • Tel +298 40 50 00 • Fax +298 40 50 09 • www.bakkafrost.com

# Støðugt limatal

TEKSTUR: ØSSUR WINTHEREIG – PRESS

Ólavur Gunnarsson kundi í síni formansfrágreiðing fegnast um, at limatalið hevur tað gott í Maskinmeistarafelagnum:

– Hvat limatalið viðvíkir, so tykist talið at verða støðugt og kanska økjandi. Soleiðis vóru tað 747 skrásettir limir harav 595 virknir nú pr. 1. mars í ár, sum helst er tað hægsta vit yvirhøvur hava havt.

– Eg havi eisini havt ta gleði at koma runt landið, har eg og restin av manningini á skrivstovuni hava verið landið runt við jólapakkum. Hetta var eisini ein sera hugalig uppgáva, men má eg tó ásanna, at hon var nógv meira umfatandi enn eg hevði ímyndað mær. Leiðin hjá mær gekk eitt nú til Suðuroyar, har eg og synirnir koyrdu alla oynna upp og niður, heilt úr Sandvík til Sumbiar, til eystara part av Eysturoynni og so runt í høvuðstaðnum.

– Eitt, sum er gleðiligt, er, at tað ikki er so sjáldan, at limir vitja á skrivstovuni, onkuntíð eftir avtalu, har viðkomandi ynskir at umrøða okkurt saman við okkum, men eisini tá onkur leggur leiðina framvið til eitt óformelt maskinmeistaraprát. Hetta havi eg hildið vera sera gagnligt, og fær man á hendan hátt eisini loddað dýpið, hvussu støðan er innan fakið.

– Alt annað líka, so tykist tað at liggja í kortunum, at eftirspurningurin eftir maskinmeistarum bara fer at vaksa, serliga við at eyguni veruliga eru latin upp fyri hesum fjøltáttaða multitaskaranum, og hvat hann kann brúkast til. Soleiðis er hann alt meira vanligur at síggja á nýggjum starvsøkjum her á landi, eitt nú innan prosjektleiðslu á størri verkætlanum.

– Endamálið hjá felagnum er áhaldandi at styrkja og verja rættindi og kor hjá limunum, og tað vil altíð verða stavnhaldið, segði formaðurin at enda í formansfrágreiðingini.

# Pensjónspengar í íbúðir

*LÍV-samtakið kannar alsamt hvørjir møguleikar eru á bústaðarmarknaðinum, sum kunnu verða gagnligar at gera íløgur í*

TEKSTUR: ØSSUR WINTHEREIG – PRESS

Formaðurin í Maskinmeistarfelagnum situr í nevndini í partafelagnum Fakfelag, sum eigur helvtina av LÍV.

Ólavur Gunnarson nam í síni frágreiðing eisini við viðurskiftini í LÍV.

– Eg havi spurt meg fyri um gongdina og fingið at vita, at grundað á niðurgongd á virðisbrævamarknaðunum var 2018 sera avbjóðandi. Serliga eru tað tey sokallaðu minni váðafúsu virðisbrøvini, sum hava klárað seg illa, meðan tey vágafúsu hava roynst heldur betur. Íløgupolitikkurin hjá LÍV er grundaður á trygg virðisbrøv, og tað hevur merkst í farna árið. Hettar sveiggjar tó upp og niður, og sæð yvir longri tíðarhorisont, verður hettar javna út.

– P/F Tryggingarfelagið LÍV hevur í dag gjørt íløgur í Føroyum fyri umleið 230 milliónir krónur Hetta svarar til umleið níggju prosent av samlaðu uppsparingini. Talan er um íløgur, sum geva eitt gott avkast í mun til váðan og aðrar tilsvarandi íløgur.

– Í sambandi við kjakið um íløgur í føroyska bústaðamarknaðin, so hevur LÍV-samtakið veitt Bústøðum lán uppá 83 milliónir krónur, soleiðis at Bústaðir fær møguleika at gjøgnumføra sínar ætlanir.

– LÍV-samtakið kannar alsamt hvørjir møguleikar eru á bústaðarmarknaðinum, sum kunnu verða gagnligir at gera íløgur í.

– Eisini hevur LÍV sett pengar í Hotel Atlantic, sum er við at taka skap við Ringvegin í Havn. Her er talan um 16 milliónir, sum eisini er tað mesta, sum felagið kemur at hefta fyri, um tað skuldi hent, at tað ikki fæst nøktandi rakstur í, og hotellið sostatt fer konkurs.

– Leggjast kann aftrat, at hotellið verður gjørt á ein slíkan hátt, at um tað skuldi hent, at saðlað verður um, so kann tað umbyggjast til íbúðir uttan stórvegis hóvasták.

Samlagstryggingin er partur av eftirlønargjaldinum pr. automatik, um ein velur LÍV sum sítt eftirlønarfelag. Hettar er ikki so, um ein velur at skifta til eitt av hinum eftirlønarfeløgunum. Tá er tað seg soleiðis, at ein sjálvur má gera gjaldsavtalu við LÌV um ein framhaldandi ynskir at verða í hesari tryggingini.

– Tað tykist langt frá, at allir limirnir hava gjørt sær hetta greitt, tá ið skift verður og viðførir hetta, at teir slett ikki eru umfataðir av hesari trygging, sum umfatar ymiskt ein kann verða raktur av, eitt nú hættisligum sjúkum, hjartatrupulleikum og hoyribreki.

– Tað kemur meira enn so fyri, at vit vera kontaktaðir av limum, sum á ein ella annan hátt renna seg í okkurt, sum fellur undir hesa trygging, fyri síðani at fáa staðfest, at teir slett ikki eru fevndir av henni. Hettar er sera harmiligt, so góðu tit, kannið tykkara viðurskifti, soleiðis at tit ikki ganga í góðari trúgv.

# Fyrsta KVINNA í nevndina

TEKSTUR OG MYNDIR: ØSSUR WINTHEREIG – PRESS

Á aðalfundinum hendi tað søguliga, at ein kvinna fyri fyrstu ferð var vald í nevndina í Maskinmeistarafelagnum.

Berit Hovsgarð úr Vági, sum siglir við Smyrli, var vald í nevndina saman við Regini Olsen úr Klaksvík.

Regin Olsen og Hans Ingvard Joensen stóðu fyri vali, og Hans Ingvard tók ikki við afturvali.

Áðrenn fundin var boðað frá, at Regin Olsen og Berit Hovsgarð stillaðu upp til nevndina.

Á aðalfundin kom eitt valevni afturat, tað var Daniel Nielsen, sum siglir við Sisimiut.

Úrslitið av nevndarvalinum var: Regin Olsen, 60 atkvøður, Berit Hovsgarð, 35 atkvøður og Daniel Nielsen, 23 atkvøður.

Tiltakslimir vóru valdir Daniel Nielsen og Tróndur við Á.

Í nevndini sita nú Ólavur Gunnarsson, formaður, Regin Olsen, John Højsted, Jóhan Mørkøre og Berit Hovsgarð.



*Berit Hovsgarð, var – sum fyrsta kvinna – vald í nevndina í felagnum.*



*Regin Olsen var afturvaldur við 60 atkvøðum.*



*Atkvøðast skuldi um nevndarlimir og tiltakslimir.*




*Markus við bryggju í Havn, áðrenn hann fór sín fyrsta túr.*

# Markus er eitt hátøkniligt arbeiðspláss

*Føroyingar manna bæði maskinrúm og brúgv á nýggja, framkomna grønlendska rækjutrolaranum Markus. Somuleiðis er partur av útgerðini umborð føroysk*

**TEKSTUR OG MYNDIR:** INGOLF S. OLSEN – PRESS

Í mars mánað fingu grønlendingar ein spildurnýggjan rækjutrolara, Markus, sum er bygdur í Spania, og á veg til fiskiskap í Vesturgrønlandi legði skipið inn í Føroyum at taka útgerð og fáa ymiskar tillagingar gjørdar. Tí arbeiðnum tók MEST sær av.

Ein partur av útgerðini umborð á Markus er føroysk, eitt nú trol frá Vónini í Fuglafirði og lemmar frá Rock Trawl-Doors í Vági, og skipið hevur eisini spillivatnsreinsiútgerðina hjá Green IQ í Hósvík. KBI í Klaksvík hevur latið amboð og útgerð, ið krevst til tað dagliga arbeiðið.

Men tað er ikki bert útgerð, sum er føroysk á nýggja, hátøkniliga trolaranum; eisini yvirmenninir, bæði í maskinuni og á brúnni, eru føroyingar.

### Hátøkni

Markus hevur kostað góðar 300 milliónir krónur at byggja, og er hann tann fyrri av tveimum trolarum, sum grønlendsku reiðaríini Qajaq Trawl A/S og Polar Seafood A/S saman lata byggja á skipasmiðjuni Freire í Vigo í Spania.

Skipið er sera væl útgjørt og tríggir stórir frystikompressarar syrgja fyri, at til ber at frysta umleið 120 tons av rækjum um samdøgrið – 100 tons av kókaðum rækjum og 20 tons av stórum rækjum til Japan. Lastin rúmar umleið 800 tons, og tá stendur alt á plattum.

Eftir at lokið er lagt á eina eskju, tekur automatikkur sær av restini, hetta líka til eskjan er á platti í lastini. Platturin verður so settur upp á pláss við trukki. Partur av hesi tøkni er ein goymsla – eitt hotell – har fimm støddir av rækjum verða goymdar, og síðani verður hvørt hotelpláss tømt, so allar eskjur á einum platti hava somu støddd.




*Diagrammið vísir, hvussu HSG-skipanin virkar í Boost mode.*

> ### ROLLS ROYCE-ÚRGERÐ
>
> MARKUS ER 80,6 METRAR LANGUR OG 17,3 METRAR BREIÐUR OG TEKUR 800 TONS AV FRYSTUM RÆKJUM Á PLATTUM.
>
> **Bruttotonnasja:** 4.719.
>
> **Høvuðsmotorur:** Rolls-Royce 5.400 kW Berger Diesel B33/45L9P.
>
> **Hjálpimotorur 1:** Rolls Royce 1.843 kW Berger Diesel C25:33L6A.
>
> **Hjálpimotorur 2:** Mitsubishi 910 KW S12R-MPTAW
>
> **Neyd-/Havnagenerator:** Volvo Penta D-13-MG 250kW
>
> **HSG:** 2.200kW PTI og 3.300kW PTO

*Framhald á næstu síðu >>*



*Tvær manningar eru á Markus, eisini í maskinrúminum, men tá skipið var í Føroyum og á fyrsta royndartúrinum vóru báðar manningarnar við. Úr vinstru eru tað Fróði Andersen, annarmeistari, Páll Olsen, fyrstimeistari, Robert Sørensen, annarmeistari, Jákup Klein, maskinstjóri, Frank Thaysen, elektrikari, Regin Gaard Joensen, fyrstimeistari, og Magnus Jacobsen, maskinstjóri.*

Hóast kapasiteturin er stórur, so eru bara 23 mans við Markus á hvørjum túri, tí á verksmiðjuni syrgja automatikkur og hátøkni fyri næstan allari arbeiðsgongdini. Her eru bara sjey mans á hvørjari vakt.

Páll Olsen, fyrstimeistari, sum vísti blaðmanninum hjá Maskinmeistaranum runt umborð, var í síni tíð – seinast í 1980-árunum og fyrst í 1990-árunum – við rækjutrolaranum Ocean Castle, sum skálamenn og fugloyingar áttu.

– Manningin mundi vera nøkulunda líka stór sum her umborð, men vit kláraðu í mesta lagi at frysta 30 tons um samdøgrið. So tað er nógv broytt, staðfestir hann.

## Siglir við ljósmotori

Í maskinuni eru teir tó samdir um, at største frambrotið við nýggja Markusi er HSG-skipanin. HSG stendur fyri Hybrid Shaft Generator. HSG-skipanin koyrir við 700VDC bussi (streymbreyt). Orkan inn á tann bussin kann koma frá hjálpimotorunum báðum (PTI) ella frá HSG-generatorinum (PTO). Fimm „mode“ eru á hesi skipan, tey eru Mechanical, PTO, PTI, AUX og Boost. Í Boost veitir høvudsmotorurin og hjálpimotorarnir orku til skrúvuna.

– At kunna hava framdrift bara við ljósmotorinum (PTI) er eitt stórt framstig, tí tað merkir millum annað, at vit kunnu gera umvælingar á høvuðsmotorin uttan samstundis at skula reka fyri vág og vind, greiðir Páll Olsen frá.

Tá Markus fór úr Føroyum, fór hann beinleiðis til fiskiskap í Vesturgrønlandi. Rækjukvotan hjá skipinum er 8.000 tons, men í Grønlandi er vanligt at keypa eitt sindur av kvotu afturat eginkvotuni.





*Páll Olsen, fyrstimeistari á Markusi, í fabrikkini. Hann sigldi í síni tíð við Ocean Castle og minnist, at teir har umborð kundu frysta 30 tons av rækjum um samdøgrið, tá fiskiskapurin var av tí besta. Markus klárar fýra ferðir tað við somu manning.*



*Á brúnni skiftast føroysku skipararnir Suni Jakobsen (vinstrumegin) og Arni Simonsen at vera umborð.*



*Í kontrollrúminum í maskinrúminum ber til at fylgja við øllum, sum fyriferst á verksmiðjuni. Myndir frá 36 upptøkutólum gera, at skjótt er at traðka til, um okkurt brek er.*



*Maskintoymið á aðrari manningini í kontrollrúminum á Markusi. Úr vinstru eru tað Fróði Andersen, annarmeistari, Páll Olsen, fyrstimeistari, og Magnus Jacobsen, maskinstjóri.*

# NMF hevði fund í Føroyum

**TEKSTUR OG MYNDIR:** INGOLF S. OLSEN – PRESS

8. og 9. apríl hevði NMF sín hálvárliga fund í Føroyum. Umframt vanliga fundin varð vitjað ymsastaðni, millum annað í vindmyllulundini hjá SEV í Húsahaga og hjá Green IQ.

NMF (Nordiska Maskinbefälsfederationen) er samstarvsfelag hjá norðurlendsku maskinmeistarafeløgunum, og fyllir samstarvið 100 ár í ár. Í tí sambandinum verður hátíðarhald við ráðstevnu og døgverða í Keypmannahavn 7. oktober.



*NMF, sum hevur umboð úr øllum teimum norðurlendsku maskinmeistarafeløgunum, hevði sín hálvárliga fund á Parnassinum á Hotel Hafnia. Úr vinstru eru tað: Ólavur Gunnarsson, Føroyar, Odd Rune Malterud, Noreg, Jan Rose Andresen, Danmark, Sjúrður Heinesen, Føroyar, Kaare Lund Nielsen, Danmark, Mikael Huss, Svøríki, Gustav Schmidt Hansen, Danmark, Helge Andersen, Noreg, Oscar Lindgren, Svøríki, Halldór Arnar Guðmundsson Ísland, NMF-forsetin Guðmundur Helgi Þórarinsson, Ísland, Joachim Alatalo, Finnland, og Robert Nyman, Finnland.*






ROYN TÍNA VITAN Í VERULEIKAKENDUM UMSTØÐUM

TAK SKEIÐINI
TÁ TÚ ERT HEIMA

Vit hava nýggjastu tøknina og bestu umstøðurnar at læra nýtt.

Siglir tú úti ella heima er tað ómakaleyst at taka skeiðið hjá okkum. Vinnuháskúlin hevur í 130 ár útbúgvið tey bestu av teimum bestu.

VIT BJÓÐA ØLL SKEIÐ

- BRM-skeið
- ERM-skeið
- ECDIS-skeið
- Tecdis-skeið
- GOC-skeið
- Heilsu-skeið
- DP-skeið
- ARPA-skeið
- Eldsløkkingar-skeið
- Trygdar-skeið
- SSO-skeið
- Stroppa-skeið

... og nógv onnur skeið

Finn skeiðsyvirlit og tilmelding á **www.skeid.vh.fo**

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

SENDISTOVAN

# Tøkni og betri hugburður skal minka um dálking

*Green IQ kom enn einaferð í brennidepilin, tá Norðurlendska Ráðharraráðið skipaði fyri ráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum var bersøgin um ambisjónirnar og ferðina á føroyska umhvørvisøkinum, men legði eisini dent á, at hugburðurin er broyttur, og at nógv er hent til tað betra*

**TEKSTUR OG MYNDIR:** INGOLF S. OLSEN – PRESS

Havið er sett í brennidepilin, nú Ísland í ár hevur formanssessin í Norðurlendska Ráharraráðnum, og 10. apríl varð skipað fyri ráðstevnu í Norðurlandahúsinum undir heitinum „Nýggjar loysnir fyri einum reinari havi".

Umframt fleiri aðrar áhugaverdar røður og framløgur var nógv gjørt burtur úr lítlu fyritøkuni Green IQ í Hvalvík. Green IQ hevur uppfunnið eina slóðbrótandi skipan at grovskilja olju og oljuúrdráttir frá vatni. Hetta bar til at lesa nógv um í Maskinmeistaranum nr. 6 frá oktober í fjør, og Green IQ var eisini í uppskoti til at vinna Umhvørvisheiðursløn Norðurlandaráðsins í fjør. Uppfinningin vann ikki sjálva heiðursløninna, men viðurkenningin skundar undir ferðina inn á altjóða marknaðin.

## Slóðbrótandi uppfinning

Jóhann Fagraklett, stjóri í Green IQ, greiddi á ráðstevnuni frá uppfinningini og fyritøkuni, og eisini Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, sum var ein av høvuðsrøðarunum á ráðstevnuni, gjørdi nógv burtur úr henni.

Við støði í sínum egnum royndum sum maskinstjóri á Norrønu greiddi hann frá, hvussu trupult tað var at halda markvirðini fyri olju í spillivatninum, og at dýra loysnin ofta var at koyra stórar nøgdir av dálkaðum spillivatni til IRF at taka sær av.

„Men her er tað, hesar framúr góðu føroysku uppfinningarnar koma inn í myndina. Við at byggja hesar skipaninar inn, so ber til uttan trupuleikar at koma niður á góðkend virði fyri útlát. Eg havi



*– Uppfinningar sum tær hjá Green IQ eru við til at seta Føroyar á heimskortið, segði Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum. Hann hevði tó ikki bert lovorð um gongdina á umhvørvisøkinum í Føroyum. Millum annað fíltíst hann á, at vit loyva meira luftdálking frá skipum enn grannalondini gera.*



Framhald á næstu síðu >>




*Sviin Fredrik Haag, skrivstovustjóri í London Convention/Protocol & Ocean Affairs hjá havumhvørvisdeildini hjá IMO (International Maritime Organization) í London hevði áhugaverda framløgu og fyrilestur.*

verið við skipið har eftrilitsfólk eru komin umborð og hava spurt, um vit klára at yvirhalda krøvini, og svaraði eg sjálvandi ja. Tá helt hann fyri, at nú pellaði eg ikki minst, tí teir kendu at kalla onga skipan, sum uttan viðari kláraði hettar. Hettar vísir, hvussu fantastiskar hesar uppfinningar eru í veruleikanum, og eru Føroyar við hesum veruliga settar á heimskortið, hvat slíkum útbúnaði viðvíkur", segði Ólavur Gunnarsson millum annað.

## Svínarí

Formaðurin legði dent á týdningin at fáa Føroyar í fremstu røð, tá tað snýr seg um at halda umhvørvið reint og at minka um útlát og dálking. Hann kundi staðfesta, at hugburðurin er broyttur, og at nógv er hent til tað betra seinastu árini, men staðfesti eisini, at langt er á mál, og at bæði ambisjónirnar og ferðin kundu verið størri. Eitt nú tá tað um luftdálking frá skipum ræður. Har eru krøvini hjá okkum nógv linari enn í



*Ráðstevnan var í Skálanum í Norðurlandahúsinum.*

grannalondunum. Hesi londini ganga undir sonevndu SECA--krøvini, sum millum annað áseta, at svávulútlátið í roykinum frá skipum ikki má fara upp um 0,1 prosent.

„Enn hava vit ikki gjørt av at seta hesi krøv í gildi hjá okkum, og tí koma útlensk reiðarí higar at liggja við skipum, sum ikki eru í drift í styttri ella longri tíð. Kunnu vit verðuliga verja at bjóða okkum soleiðis fram sum eitt parkeringsøki fyri dálking? Eisini er bara at hyggja eftir teimum útlendsku skipunum, sum liggja og umskipa veiðu í føroyskum havnum, eitt nú í Runavík, á Signabø og í Ánunum; nei, eg meini, at tað skal verða mát fyrigrammleika eftir at fáa hesi oyruni í kassan og aftur fyri lata hetta svínaríið ganga út yvir lokalu borgararnar. Her eiga mynduleikar at traðka til og seta krøv, sum lyfta okkum upp á eitt altjóða støði“, segði Ólavur Gunnarsson.

## Hepni

Hann minti eisini á, at tað meira er hepni enn umsorgan og skynsemi, sum ger, at vit í Føroyum kunnu gleðast um eitt reint havumhvørvi.

„Føroyar er ein fiskivinnutjóð, ið livir av tí, sum kemur úr havinum, og vit branda okkum við, at vit hava heimsins reinasta hav.



*Aksel V. Johannesen, løgmaður, setti ráðstevnuna.*






*Sirið Stenberg, landsstýriskvinna, umsitur umhvørvismál, og hon flutti fram røðu. Vinstrumegin er tað Ásmundur Guðjonsson, stjóri í norðurlendska atlantssamstarvinum NORA, sum var orðstýrari.*



*Jóhann Fagraklett, stjóri í Green IQ, greiddi frá teirra uppfinning – ein effektiv skipan at skilja olju og oljuúrdráttir frá vatni.*

So er tað, eg vil spyrja, um hettar verðuliga er so, og vit sostatt eru meira tilvitað um at verja havumhvørvið, sum vit liva av, enn onnur. Stutta svarið er nei, vit eru ikki petti frægari enn onnur, og um so er, at her er reinari, so er tað ikki okkum fyri at takka. Heldur er talan um, at vit liggja so fjarskotið, og skipaferðslan av tí sama er avmarkað“, segði formaðurin í Maskinmeistarafelagnum.

# 16 maskinmeistarar og 12 maskinistar

**TEKSTUR:** INGOLF S. OLSEN – PRESS **MYNDIR:** ERLAND HENTZE RASMUSSEN

Tvær prógvhandanir hava verið á Vinnuháskúlanum í Havn, síðani seinasti Maskinmeistarin kom út. 25. januar fingu 16 maskinmeistarar prógv, og 15. mars fingu 12 nýklaktir maskinistar síni prógv.



*Hesir fingu prógv sum maskinmeistarar 25. januar: Sonny Hansen, Sámal Jákup Joensen, Bárður Hjaltalin Ellingsgaard, Magnus Fríði á Rógvi Simonsen, Jógvan Sivar Edvardsson, Jón Súni Christiansen, Jón Dahl-Olsen, Áki Ellendersen, Olaf Fossdal Guttesen, Kai Petersen, Dávid Thomsen, Jóhannus Hansen, Martin Poulsen, Ári Hansen, Jesar Joensen og Jacob Guttesen.*

*Virðislønir:*
*1. Jesar Joensen, grindaknív frá SEV.*
*2. Jacob Guttesen, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum.*
*3. Áki Ellendersen, kikara frá Norðoya Sparikassa.*

*Ídnisvirðisløn:*
*Jesar Joensen, lummaur frá Skansi Offshore.*



*Hesir fingu prógv sum maskinistar 15. mars: Andrew Bandara, Brian Breyt Thomsen, Carl Adolf Rasmussen, Erhard Olaf Arni Nybo, Fríðjón Julian Jacobsen, Fróði Bærendsen, Fróði Tausen, Grettir Hammer, Hilmar Joensen, Ronni Hammer, Torbjørn Torsteinsson Lützen og Óli Christian Danielsen.*

*Virðislønir:*
*1. Grettir Hammer, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum.*
*2. Hilmar Joensen, kikara frá Trygd.*
*3. Torbjørn Torsteinsson Lützen, lummaur frá Antares.*



*Bjarni Jacobsen er í dag 86 ára gamal. Hann kann síggja aftur á eitt spennandi arbeiðslív sum maskinmeistari.*

# Úr Svínoy til Grønlands og Rio de Janeiro

*Hann vaks upp millum smálomb og spælandi børn í Svínoy. Her lærdi hann eisini bátasmíð. Tá hann seinni gjørdist útbúgvin maskinmeistari, var tað maskinmeistarayrkið, sum førdi hann langt út í heim. Arbeiðslívið endaði kortini aftur í Svínoy, tá hann lat byggja stóra smoltstøð í oynni*

**TEKSTUR OG MYNDIR:** GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN, PRESS

Vit hittast heima við hús hjá 86 ára gamla Bjarna Jacobsen á Frælsinum í Havn. Eftir at hava prátað eina løtu, fara vit útum – út í garðin. Har úti stendur bilhúsið ella garasjan hjá Bjarna. Men tað er ongin bilur í henni í dag. Í staðin síggja vit byrjanina til ein spildurnýggjan føroyskan bát. Kjølurin er strektur, og skjótt standa teir báðir vinmenninir, Bjarni Jacobsen og Michael Matras, og eyðgleiða komandi farið. Michael er júst komin at heilsa uppá Bjarna.

– Tað eru so fáir bátasmiðir í dag, so vandi er fyri, at hetta handverkið doyr út, og tað vil ein av versynum mínum ikki hava. Tí hevur hann biðið meg víst sær, hvussu tú smíðar ein føroyskan bát, og tað er tað, vit eru í holt við nú, greiðir Bjarni Jacobsen frá.

Hann hevur smíðað fleiri føroyskar bátar, bæði stórar og smáar. Hann hevur eisini verið tikin í leikum at smíða borðbátar, heilt nógvar borðbátar hevur hann smíðað millum ár og dag.



*Framhald á næstu síðu >>*

## Uppvaksin í Svínoy

Bjarni Jacobsen var borin í heim í Svínoy 12. juli í 1932, sonur Mallu og Edvard Jacobsen. Í Svínoy gekk Bjarni í skúla, har sleit hann barnaskógvarnar, og har lærdi hann bátasmíð. Tað var mammubeiggin, Pollarin nevndur, ið lærdi hann bátsmíð. Pollarin, ella Poul Johannes, sum hann æt, var tiltikin góður og snøggur bátasmiður, og fleiri av bátum hansara eru framvegis at síggja ymsastaðni í Føroyum.

Sum 14 ára gamal fór Bjarni til skips fyrstu ferð. Teir fóru til Íslands við línubátinum Svínoyar Bjarna, og hendan sama túrin fylti Bjarni Jacobsen 15 ár. Tað var í 1947.

– Tá varð nógv siglt uppá Aberdeen við feskum fiski, og teir fyrstu tríggjar túrarnar fóru eisini vit til Aberdeen við fiskinum.

## Fyrst í smiðjulæru

Bjarni Jacobsen hevði frá ungum árum ynski um at gerast maskinmeistari. Skuldi tú uppá maskinmeistaraskúla, mátti tú fyrst í smiðjulæru, og tað var ikki bara sum at siga tað at fáa lærupláss í einari smiðju. Hann hevði spurt seg fyri hjá Ídni í Klaksvík, men har var onki lærupláss júst tá.

Ein dagin er Bjarni staddur umborð á fiskiskipinum Polo, í Klaksvík. Pápi hansara var stýrimaður á Polo, og Bjarni var farin at hjálpa teimum at gera skipið til.

– Ein dagin, meðan vit standa á dekkinum á Polo, nú kemur Hans Jacob Justesen, ein teirra, sum átti Ídni, oman eftir bryggjuni. Tá rópar hann: „Edvard, sonur tín kann koma í læru nú."

So í staðin fyri at fara á Suðurlandið við Polo, sum ætlanin var, fór Bjarni í læru sum maskinsmiður. Hann minnist, at har vóru nógvir dugnaligir smiðir, teirra millum ein grovsmiður, sum æt Theodor Askham. Í smiðjuni hjá Ídni var nógv ymiskt arbeiði gjørt, nógv skip vóru umvæld – ikki minst mongu ensku trolararnir, sum javnan komu inn á Klaksvík.

Trý ár seinni fór Bjarni Jacobsen upp á maskinskúla. Smiðjumeistarin hjá Kjølbro, Jóhan í Grótinum, rak maskinskúlan í Klaksvík um tað mundið.

– Tað var hart í byrjanini, tí matematikk hevði eg ongantíð havt. Tað fangaði eg so eisini, og til próvtøkuna var matematikk tað einasta, sum eg fekk fult í, flennir Bjarni.

## Út at sigla

Eftir at hava fingið maskinmeistaraprógv fór Bjarni Jacobsen við Tjaldrinum til Danmarkar at vitja systkinabarnið Páll Rólant Poulsen, sum las niðri um tað mundið. Páll Rólant hjálpti Bjarna at søkja sær kjans.

– Fyrst fóru vit til A.P. Møller, og jú, eg kundi fáa kjans um 14 dagar til ein mánað, men tað tímdi eg ikki at bíða eftir. Hjá Lauritzen og DFDS var støðan hin sama – um einar 14 dagar til ein mánað. So royndi eg hjá Skov, sum tá átti 12 skip og hevði seks skip í gerð. Og har bar til, eg fekk kjans beinanvegin, minnist Bjarni.

– Hetta var eitt gamalt skip, og maskinan hevði tað, vit róptu umkastning, tað vóru tað fá skip, ið høvdu. Tað riggaði ikki altíð so væl. Eg minnist einaferð, vit komu inn í Casablanca í Marokko. Tað var rættiliga stutt frá pirinum og til atløgubryggjuna. Nú hendi so tað, at hann kastaði ikki um. Tá kom maskinstjórin loypandi niður í maskinrúmið, tók eina stóra rørtong, og fekk kastað um við henni. Nei, tað var vánaligt maskinarí, heldur Bjarni Jacobsen.

> **”Tað var hart at fara uppá maskinskúla, tí matematikk hevði eg ongantíð havt“**

Ein annan trupulleika, Bjarni minnist frá hesum skipinum, var, at annarmeistarin var so váttligur. Hann kom mangan á vakt við góðari kenning. Bjarna dámdi onki at lata hann loysa seg av við góðari føring.

– Einaferð biði eg hann so fara upp aftur í koyggjuna. Hann gjørdist illur, tí tað skuldi ongin føroyingur koma at siga sær, hvat hann skuldi gera. Eg segði so við hann, at hann slapp ikki at loysa meg av, tí hann var ikki í standi til tað. Maskinstjórin hevði hoyrt rópini av okkum, so hann kom niður og bað meg bara fara, tí hann skuldi taka sær av hesum manninum, greiðir Bjarni frá.

Hendan fyrsta túrin var hann við sum maskinassistentur, sum tað varð rópt. Teir sigldu nógv í Miðjarðarhavinum og upp á Vesturafrika. Í Miðjarðarhavinum sigldu teir nógv uppá Ísrael.

– Ein túr, eg komi at hugsa um, er ein túrur, sum vit gjørdu úr Grikkalandi til Danmarkar við fullum skipi av bananum. Lastin var full, og nógv lá á dekkinum, so vit gingu stútt og ótu bananir. Men tað skalt tú ikki gera ov nógv av, tí endin var, at vit fingu ilt í búkin, flennir hann.

## Noyddist við dampskipi

Tá Bjarni hevði siglt eitt ár við Skov, fór hann at arbeiða í Smiðjuni hjá

*Ein av mongu borðbátunum, sum Bjarni hevur gjørt millum ár og dag.*



Kjølbro í eina tíð. Har gjørdu teir alt vanligt smiðjuarbeiði. Kjølbro áttu eisini fleiri skip, og umborð á teimum var ymiskt at gera. Um várið í 1954 fór hann aftur út at sigla, hesaferð við DFDS.

– Tað var soleiðis tá, at fyri at gerast maskinstjóri, skuldi tú sigla eina ávísa tíð við einum dampskipi. So eg fór at sigla við einum dampskipi hjá DFDS, sum sigldi á einari farðleið millum Danmark og Brasil. Vit vóru til dømis nógv í Rio de Janeiro. Ta tíðina minnist eg, at eg hevði trý summur upp í slag, fyrst var eg í Brasil um veturin, og tá var tað jú summar í Brasil, síðan fór eg til Evropa, tá summar var her, og so aftur til Brasil veturin eftir, og tá var jú aftur summar har. So eg upplivdi trý summur upp í slag, flennir hann.

Hann sigldi eisini sum maskinmaður millum Keypmannahavn og Oslo við Kronprins Olav, sum var eitt ferðamannaskip hjá DFDS. Pláss var fyri 1.400 ferðafólkum.

– Kronprins Olav hevði tvær maskinur, og átta mans vóru í maskinrúminum. Hetta vóru diesel-maskinur, og nógv var at gera.

## Við fiskiskipum

Hann skifti eitt sindur ímillum at sigla úti og at sigla við føroyskum fiskiskipum. Hetta var tíðin, tá línubátarnir vuksu í tali. Og ein av fyrstu línubátunum, sum Bjarni var við sum maskinmeistari, var

> **”Eftir kríggið var stórt mangul uppá maskinmeistarar. Grundin var tann, at tá skip vórðu søkt undir krígnum, fóru maskinmenninir ofta niður við skipunum, tí teir vóru staddir í maskinrúminum, tá vanlukkan hendi“**

Jógvan S. Tað lívið dámdi honum bara væl.

– Vit fiskaðu mest á Flemish Cap, og tað er eitt løgið sjóøki, tí har rullar altíð. Annars var maskinaríið á Jógvani S nýtt, so tað gekk bara heilt væl, minnist Bjarni.

Eitt skifti hevði hann trupulleikar við maganum, hann hevði fingið ein skaða. Ein dagin, teir eru í ísfiski undir Føroyum, fær hann trupulleikar við maganum, og skiparin, Urbanus, helt frægast vera at sigla inn. Tá hann kom á Landssjúkrahúsið, tók Eliesar Arge, lækni, ímóti honum.

– Hann manererar so eina løtu við búkin, og brádliga er pínan burtur. Tá sigur hann við meg, at eg hevði havt tarmakast (tarmslyng), og hann fekk loyst trupulleikan uttan skurðviðgerð. Tarmakast er ógvuliga pínufult, so tað var ein stórur lætti, tá Arge fekk loyst tað, sigur Bjarni Jacobsen.

Hann sigldi eisini við Klakki. Palli hjá Marionnu var skipari, og fiskiskapurin var góður, sum hann plagdi at vera hjá Palla hjá Marionnu.

Í eini trý ár var Bjarni maskinmeistari við Gamla Andrassi. Skipari var kendi skiparin úr Vági,



*Framhald á næstu síðu >>*



*Í 1981 fór nýggi trolarin hjá Bjarna og øðrum av bakkastokki í Fraklandi.*
*Mynd: Privat*



*Bjarni var bara 14 ára gamal, tá hann fór fyrsta túrin til skips. Hendan sama túrin fylti hann 15 ár.*
*Mynd: Privat*

Mourits hjá Jóan Peturi. Teir royndu mest í rullinum á Flemish Cap, og um veturin royndu teir undir Føroyum.

– Mourits var ein ómetaliga dámligur maður, og væl gekk hjá honum at fáa fisk, sigur Bjarni Jacobsen.

Eitt skifti sigldi Bjarni eisini við Stellu Kristinu og Stellu Karinu, sum brøðurnir, Erling og Tryggvi Laksafoss áttu.

## Við Krúnborg

Bjarni Jacobsen skifti arbeiði av og á, sum vit longu hava frætt. Stundum arbeiddi hann í smiðjum í landi, stundum við línubáti, og hann sigldi eisini úti.

Í útvið tvey ár smíðaði hann bátar burturav, mest áttamannafør. Men ein Grønlandsbát smíðaði hann eisini.

– Eg hevði úr at gera við bátasmíðinum. Bátaverkstaðurin var í kjallaranum heima við hús. Einaferð hevði eg tvey áttamannafør í gerð samstundis.

Tá menn so funnu útav, at eg eisini var maskinmeistari, vildu teir eisini hava meg at seta motorarnar í. Men eg veit ikki, eg troyttaðist av bátasmíðnum, og ein dagin segði eg við konuna, at nú fór eg út aftur at sigla, greiðir Bjarni frá.

Tá hann byrjaði at sigla úti var vanligt, at menn vóru úti í hálvt annað ár út í eitt. Hetta var nú broytt til, at menn vóru fýra mánaðir úti og tveir heima. Tað var hetta, sum birti hugin hjá Bjarna at fara út aftur at sigla. Hetta var um tað mundið, sum Eiler Jacobsen keypti Krúnborg.

Dagin fyri, sum hann skuldi út at sigla sum maskinstjóri við einum donskum skipi, sum lá í Italia, ringir Beinta, kona Eiler Jacobsen, til hansara. Krúnborg var spildurnýggj, og hevði bara verið tveir túrar. Beinta heilsar Bjarna frá Eileri, og sigur, at Krúnborg er á veg inn á Havnina og manglar ein annanmeistara. Hon spyr, um hann áhugaður.

– Jú, eg smekkaði til beinanvegin, og gav avboð niður til Danmarkar, sigur Bjarni.

Hetta var í 1973. Næstu átta árini sigldi hann við Krúnborg.

## Mundi gingið burtur

Í februar í 1975 var Bjarni Jacobsen teirra millum, sum við Krúnborg leitaðu eftir Eiler Jacobsen í Norðsjónum. Eiler hevði latið smíðað ein stuttleikabát, Beintu, í Noregi, og saman við norðmanninum, sum hevði smíðað bátin, legði hann til havs eitt leygarkvøld um sjeytíðina við kós móti Føroyum. Men teir komu í ódnareður, og onki frættist frá teimum.

Tá ongin sá ella hoyrdi nakað til Eiler Jacobsen og norðmannin sunnudagin eftir, sum teir vóru farnir avstað leygardagin, varð farið at leita. Fleiri nótabátar fóru av Hetlandsleiðini at leita, og úr Føroyum fóru skip eisini at leita.



*Michael Matras og Bjarni Jacobsen við strekta kjølin í bilhúsinum – ella bátaverkstaðnum hjá Bjarna.*

– Veðrið var so ómetaliga vánaligt, so vit væntaðu, at teir vóru gingnir burtur. Fleiri skip fóru at leita, og vit leitaðu eisini. Agga í Garðastovu var skipari á Krúnborg tá. Eg minnist, at Agga og Sámal Jacobsen, beiggi Eiler, tosaðu saman. Tá sigur Sámal við Agga, at í hesum veðrinum er ein bátur á hasari støddini ikki omaná.. So vónirnar vóru ringar at finna teir á lívi, minnist Bjarni Jacobsen.

Tað vísti seg, at teir báðir umborð á Beintu høvdu lagt seg undir síðuna á einum stórum russiskum skipi at kroka. Russarin boðaði Tórshavn Radio frá, at teir høvdu ein hvítan glastrevjabát liggjandi undir síðuni, men at teir fingu ikki samband við teir báðar menninar umborð, og veðrið var vánaligt. Tá var hetta ongin annar enn enn nýggi stuttleikabáturin hjá Eileri Jacobsen.

– Tá vit frættu hetta, sigldu vit á leiðina. Vit sigldu síðani inn til Hetlands, meðan Beinta sigldi undir liðini á okkum, og har tóku vit bátin uppí Krúnborg. Soleiðis komu bátar og menn heim til Føroya í øllum góðum, greiðir Bjarni Jacobsen frá.

## Orkuleiðari í Grønlandi

Í tvey ár búðu Bjarni og familjan í Grønlandi. Bjarni var staddur í Keypmannahavn, tá hann ein dagin hittir ein fyrrverandi floksfelaga hjá sær, Mathias hjá Lambakristjani, nevndur. Hann sigur Bjarna, at hann ætlar sær í Grønlandsmálaráðið at vita, um hann kann fáa starv sum leiðari á einum el-verki í Grønlandi. Sjálvur hevði Bjarni ongan hug at fara til Grønlands, tí hann helt tað vera ov kalt har yviri.

– Men eg fór kortini við honum inn í Grønlandsmálaráðið. Tá ið Mathias var liðugur at tosa, hyggur hesum maðurin í Grønlandsmálaráðnum upp á meg, og spyr um eg eisini eri maskinmeistari. Jú, tað eri eg, svaraði eg honum. Hann spyr meg so, um eg ikki eisini havi hug at fara yvir til Grønlands, tí tey høvdu fleiri el-verk, ið høvdu tørv á maskinmeistarum, sum kunnu leiða verkini. Lønin var góð og skattafrí, so eftir at hava tosað við konuna gjørdu vit av at fara. Eg gjørdist leiðari á einum el-verki í Scorebysund, greiðir Bjarni Jacobsen frá.

Tað var langt at fara til handils frá el-verkinum, einir tríggir fjórðingar. So Bjarni fekk sær hund, ikki bara ein hund, men ellivu hundar, fekk hann sær. Tá hann so skuldi til handils, spenti hann hundarnar fyri sletuna, tók byrsuna upp á herðarnar og so til stroks.

– Møtti tú einari ísbjørn á vegnum, so mátti tú kunna verja teg, sigur Bjarni.

Nógvur fuglur var í økinum kring Scorebysund, lomvigi og eitt fuglaslag, ið líkist nógv lunda, men sum er nakað minni enn lundi. Bjarni og aðrir, hann kom at kenna í Scorebysund, skutu nógvan fugl. Teir veiddu eisini kóp, sum fyri tað mesta varð brúktur til hundaføði.

– Vit ótu eisini kópatvøst onkuntíð, men spikið av kópi dámdi mær ikki, sigur Bjarni.

## Keypti sjálvur skip

Í 1980 fóru Bjarni og yngsti beiggi hansara, Ingi Jacobsen, saman við tveimum synum Bjarna at tosa um at smíða skip. Endin var, at teir gjørdu sáttmála við Forges Caloin-skipasmiðjuna í Fraklandi. Og í apríl mánaða í 1981 fór nýggi trolarin, Dragaberg, av bakkastokki í Estaples sur Mer í Fraklandi.

Ingi Jacobsen var skipari, og Bjarni var maskinmeistari og reiðari.

Tað gekk hampuliga væl okkurt árið, men sum heild bar illa til at fáa tað at mala runt. Nøkur ár seinni gjørdu teir av at selja Dragaberg.

– Um hetta mundið sá onki serligt út við fiskarínum undir Føroyum, og tá vit plagdu at avreiða á Bacalao, gekk Hans Pauli Johannesen har og mól viðhvørt. So ein dagin spyr hann meg, um hetta skipið var til sølu. Jú, sigi eg, alt er til sølu fyri rætta prísin. Hans Pauli spyr so, hvat vit vilja hava fyri hann. Eg hugsaði við mær sjálvum, at nú skuldi eg bara leggja nóg mikið á, so eg sigi við hann, at vit vildu hava 14 milliónir fyri hann. Tá svaraði hann mær, at vit skuldu fáa 14 milliónir „cash" frá sær, greiðir Bjarni Jacobsen.

Soleiðis varð Dragaberg seldur.

## Smoltstøð í Svínoy

Í seinnu helvt av áttatiárunum fór Bjarni Jacobsen undir at byggja eina smoltstøð í Svínoy. Hetta var eitt rættiligt frambrot fyri bygdina, sum tá var farin at minka av álvara. Meðan smoltstøðin var bygd, vóru fleiri mans í arbeiði, og um sama mundið gjørdu teir nýggja bátahylin í bygdini, og har arbeiddu eisini fleiri fólk. So tá var nógv arbeiði í Svínoy.

Eftir at smoltstøðin var liðug, høvdu fleiri fólk arbeiði á støðini í nøkur ár, eisini onkur maskinmeistari aftrat Bjarna.

– Á eini smoltstøð eru maskinur og tól, har tað er neyðugt at hava fólk við innliti í slíkt, og tá er gott við maskinmeistarum. Og tað vísir seg soleiðis, at tað er altíð róp eftir maskinmeistarum. Eg minnist, at menn plagdu at siga eftir kríggið, at tá var so ómetaliga stórt mangul uppá maskinmeistarar. Orsøkin var tann, at tá skip vórðu søkt undir krígnum, fóru maskinmenninir ofta niður við skipinum, tí teir vóru fyri tað mesta staddir í maskinrúminum, tá vanlukkan rakti, sigur Bjarni Jacobsen.

Í nøkur ár gekst væl við smoltstøðini hjá Bjarna Jacobsen, men so gjørdust tíðirnar truplari hjá laksa– og smoltalarum.

– Vit komu so illa fyri, at okkurt heilt serligt skuldi gerast, tí tað slapst ikki av við smoltið. Eg royndi at fáa landsstýrið at geva mær loyvið at ala á Gulanum á Argjum, men hetta varð noktað. Eg fekk at vita, at eg hevði smoltstøð, so eg hevði ongan tørv á aling á sjónum eisini. Men tað var júst tað, sum manglaði – ikki bara hjá mær sum smoltalara, men eisini hjá øðrum smoltalarum, sigur Bjarni Jacobsen.

Hevði hann fingið aliloyvi, so kundu smoltini, hann hevði gangandi á smoltstøðini í Svínoy, verið sett út á Gulanum. Tað kundi verið við til at tryggja alt virksemið. Í staðin var endin tann, at Bjarni varð noyddur at koyra smolt fyri 6 milliónir krónur á sjógv.

– Tá misti eg mótið, sigur hann.

Um aldarskiftið varð smoltstøðin stongd.

Í dag eigur elsti sonur Bjarna, Sjúrður Jacobsen, smoltstøðina. Hann hevur ætlanir um at ala rognkelsi.

Í meginpartinum av arbeiðslívi sínum er maskinmeistaraútbúgvingin komin væl við, bæði tá hann sigldi úti, tá hann sigldi við føroyskum fiskiskipum, í smiðjuarbeiði, í arbeiðinum sum leiðari á el-verki í Grønlandi, og at enda, tá hann hevði smoltstøðina í Svínoy.

– Eina maskinmeistaraútbúgving kanst tú brúka til so nógv, sigur Bjarni Jacobsen.



# *FØÐINGARDAGAR Maskinmeistarafelagið:*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Vilhelm Nielsen | Tórshavn | 16/4-1949 | 70 ár |
| Leivur Hentze | Trongisvágur | 2/5-1949 | 70 ár |
| Jóhan Pól Christiansen | Hoyvík | 7/3-1959 | 60 ár |
| Niels Peter Olsen | Tórshavn | 14/4-1959 | 60 ár |
| Kalli Váðklett | Klaksvík | 29/4-1959 | 60 ár |
| Sigmar Hansen | Velbastaður | 4/5-1959 | 60 ár |
| Pól Øregaard Jacobsen | Norðragøta | 12/5-1959 | 60 ár |
| Ragnar Dam | Hoyvík | 29/3-1969 | 50 ár |
| Finn Danielsen | Klaksvík | 10/4-1969 | 50 ár |
| Óli Andrias Christiansen | Kollafjørður | 5/5-1969 | 50 ár |
| Tórstein Magnussen | Miðvágur | 2/3-1979 | 40 ár |
| Asbjørn Pólsson | Hósvík | 2/4-1979 | 40 ár |
| Árant Løkjá | Tórshavn | 28/4-1979 | 40 ár |
| Rúni Eyðunsson Elttør | Tórshavn | 24/5-1979 | 40 ár |
| Mannbjørn Nesá | Nes, Eysturoy | 25/5-1979 | 40 ár |
| Gunnar Már Hjaltason | Hov | 14/3-1989 | 30 ár |
| Tórvald Steingrímsson | Tórshavn | 17/4-1989 | 30 ár |

# TÍÐINDI frá Maskinmeistarafelagnum

**2. januar** Fundur við hini manningarfeløgini um fiskiskap eftir makreli (kvotu) hjá partrolarunum í ES-øki.

**7. januar** Fyrireikandi fundur í Vinnuhúsinum um at avtala framferðarháttin, nú samráðingarnar við RFH eru í gongd.

**8. januar** Eftirmetingarfundur av Sjóvinnuforuminum. Fundurin varð hildin í hølunum hjá Sjóvinnufyrisitingini.

**10. januar** Skundfundur í Fiskivinnuráðnum. Til umrøðu er uppboðssøla av fiskirættindum á Flemmish Cap.

**15. januar** Handan av sáttmálakrøvum til sáttmálasamráðingarnar við RFH. Fundurin varð hildin í Vinnuhúsinum.

**17. januar** Fundur í arbeiðsbólkinum at viðgera og eftirmeta fiskiskapin eftir botnfiski undir Føroyum.

**18. januar** Fundur við hini manningarfeløgini at viðgera sáttmálakrøvini frá RFH.

**22. januar** Fundur við maskinmeistara hjá SEV á Sundi. Fundurin varð hildin á verkinum á Sundi.

**23. januar** Fyrsti samráðingarfundur við RFH. Fundurin varð hildin í Vinnuhúsinum.

**24. januar** Fundur við umboð fyri Vinnuhúsið um setan av maskinmeistara hjá NET. Fundurin varð hildin í Vinnuhúsinum.

**25. januar** Prógvhandan á Vinnuháskúlanum, har 16 maskinmeistarar fingu prógv. 2. sáttmálasamráðingarfundur við RHF. Fundurin varð hilin í Vinnuhúsinum. Nevndarfundur á skrá.

**29. januar** Fundur við maskinmeistararnar á Smyrli.

**31. januar** Fundur í arbeiðsbólkinum at viðgera og eftirmeta fiskiskapin eftir botnfiski undir Føroyum.

**1. februar** 3. samráðingarfundur við RFH. Fundurin varð hildin í Vinnuhúsinum. Fundur við KAF um umflokking av maskinistum hjá SEV.

**4. februar** Sparringsfundur í P/F Fakfelag í sambandi við møguligar íløgur hjá LÍV. Fundur við hini manningarfeløgini um Fasta Gerðarættarmálið.

**5. februar** Fundur við Fasta Gerðarrættin um kæruna, sum manningarfeløgini hava lagt fyri rættin um luttøku í frádráttinum av kvotukeypi.

**7. februar** Fyrrireikandi fundur til komandi sáttmálasamráðingar við Føroya Reiðarafelag. Fundurin varð hildin í hølunum hjá FSN.





**8. februar** 4. samráðingarfundur við RFH. Fundurin varð hildin í Vinnuhúsinum.

**11. februar** 5. samráðingarfundur við RFH. Fundur í arbeiðsbólkinum at viðgerða og eftirmeta fiskiskapin eftir botnfiski undir Føroyum.

**12. februar** Limafundur fyri limirnar í fiskiflotanum. Til umrøðu vóru komandi sáttmálasamráðingar við FR. Umleið 20 limir møttu á fundi.

**13. februar** Fundur ímillum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag at samanskriva sáttmálarnar.

**15. februar** Fundur ímillum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag at samanskriva sáttmálarnar. 6. samráðingarfundur við RFH.

**20. februar** Fundur við limir í RFH. Til torradagsorðaskifti um fiskivinnuna í Klaksvík.

**21. februar** Fundur ímillum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag at samanskriva sáttmálarnar.

**22. februar** 6. samráðingarfundur við RFH.

**26. februar** Fundur ímillum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag at samanskriva sáttmálarnar.

**28. februar** 7. samráðingarfundurin við RFH. Ávegisemja undirskriva, og partarninr samdust at framleingja sáttmálan í eitt sam-døgur. Nevndarfundur.

**1. mars** Fundur um útsetan/afturtøku av Fasta Gerðarrættarmálinum ímóti Føroya Reiðarafelag. 8. samráðingarfundur við RFH, har nýggjur 2 ára sáttmáli varð undurskrivaður.

**4. mars** Fundur ímillum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag at samanskriva sáttmálarnar.

**5. mars** Fundur við lim um sáttmálastøðuna hjá honum.

**7. mars** Fyrireikandi fundur um samráðingarnar við Føroya Reiðarafelag.

**8. mars** Fundur við JOSH um framløgu á aðalfundinum. Fundur við hini manningarfeløgini um samanskriving av sáttmálakrøvum.

**12. mars** Fundur við hini manningarfeløgini um endaliga samanskriving av sáttmálakrøvum.

**13. mars** Handan av krøvum til sáttmálasamráðingarnar ímillum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag. Fundurin varð hildin í hølunum hjá FSN.

**15. mars** Prógvhandan á Vinnuháskúlanum, har 12 maskinistar fingu prógv.

**16. mars** Aðalfundur á Hotel Hafnia. Umleið 50 limir vóru á fundinum. Regin Olsen varð afturvaldur og Berit Hovsgarð varð nývæld í nevndina. Umframt tey vórðu Daniel Nielsen og Tróndur við Á valdir sum tiltakslimir.

**18. mars** 1. samráðingarfundur ímillum manningarfeløgini og FR. Fundurin var í Vinnuhúsinum.

**19. mars** Nevndarfundur í P/F Fakfelag. Á skránni var lógarbroyting til viðtøkurnar og fyrireiking til komandi aðalfund. Fundurin varð hildin í hølunum hjá S&K.

**20. mars** 2. samráðingar-fundur ímillum manningarfeløgini og FR. Fundurin varð hildin í hølunum hjá FSN.

**21. mars** Fundur ímillum manningarfeløgini um sáttmálasamráðingarnar við FR.

**22. mars** 3. samráðingarfundur ímillum manningarfeløgini og FR. Fundurin varð hildin í hølunum hjá FSN.

**25. mars** 4. samráðingarfundur ímillum manningarfeløgini og FR. Fundurin varð hildin í hølunum hjá FSN.

**26. mars** 5. samráðingarfundur ímillum manningarfeløgini og FR. Fundurin varð hildin á Hotel Føroyum.

**28. mars** 6. samráðingarfundur ímillum manningarfeløgini og FR. Fundurin varð hildin á Hotel Føroyum. Endin av fundinum var, at samráðingarnar slitnaðu, og Semingstovnurin varð innkallaður. Fundur við semingstovnin.

**29. mars** Nevndarfundur. Á skránni var skipan av nevnd, val av næstformanni og onnur mál. Fundur við semingstovnin.

**3. apríl** Fundur við semingstovnin.

**5. apríl** Semingsroynd á Hotel Føroyum.

**6. apríl** Semingsroynd á Hotel Føroyum. Semingsuppskot lagt fyri partarnar. Partarnir hava svarfreist til kl. 13.00 mánadagin.

**8. apríl** NMF-fundur á Hotel Hafnia. Fundur við hini manningarfeløgini á Hotel Hafnia, har avgjørt var at havna semingsuppskotið. Fundur við Semingstovnin, har boðað varð frá, at vit havnaðu semingsuppskotið. Nýggj semingsroynd byrjar alt fyri eitt. Døgurði við NMF-luttakarunum í Stokkastovuni í Kirkjubø.

**9. apríl** Semingsroynd á Hotel Føroyum. Vitjan við NMF-luttakarunum í Gásadali, har Green IQ hevði eina framløgu og demonstreraðu teirra útbúna. Millummáli á Gásadalsgarði.

**10. apríl** Semingsroynd á Hotel Føroyum. Nýtt semingsuppskot lagt fyri partarnar. Semja um eitt ára sáttmála undurskrivað. Norðurlendskt umhvørvisseminar í Norðurlandahúsinum, har formaður felagsins hevið eina framløgu.


TRYGGJA TÍNA
FRAMTÍÐ
RM
317
01 01 2019 9181-4788984